# Borifelag letur upp skrivstovu í Havn



*Ninna Vatnhamar, sum starvast hjá Tor Shipping hevur havt tað spennandi men eisini krevjandi uppgávuna at útvega borifelagnum Dolphin Drilling íbúðir og skrivstovu í Havn*
*Mynd Jens K. Vang*

OLJA
*Jan Müller*

Nú tað nærkast 4. boringini á føroyska landgrunninum er aftur við at koma røringur í her á klettunum. Stóra norska felagið Fred Olsen, sum eigur fleiri boripallar og skip, letur 1. juni upp skrivstovu í Havn. Felagið eigur boriskipið Bedford Dolphin, sum skal bora brunnin fyri Agip og Føroya Kolvetni. Boringin er sett at byrja umleið 15. juni.

Seinastu tíðina hava lýsingar verið á síggja í bløðunum, har skipaagenturin hjá borifelagnum, Tor Shipping, hevur søkt eftir húsum og fólki at manna skrivstovuna. Hetta skilst er alt komið uppá pláss. Eitt av heimsins mest framkomnu boriskipum Bedford Dolphin setti herfyri kósina móti Føroyum. Tað hevur arbeitt í Brasilia og kom herfyri til Las Palmas. Haðani fer tað so í næstum við kós móti føroyska landgrunninum at bora ein brunn fyri Agip.

Hjá Tor Shipping í Havn hava tey havt úr at gera seinastu tíðina, nú tey fingu litið upp í hendi at taka sær av arbeiðsuppgávum fyri Dolphin Drilling. Tað er Ninna Vatnhamar, sum hevur staðið fyri hesi spennandi men eisini krevjandi uppgávuni, tí altjóða oljuvinnan setir stór krøv til dygd og støði í tí hon tekst við.

Lýst hevur verið eftir trimum íbúðum/húsum til at hýsa starsvfólkunum hjá Dolpin Drilling, sum Fred Olsen eigur umframt skrivstovu og manning til skrivstovuna. Frá Tor Shipping frætta vit, at nógv hava svarað uppá lýsingarnar og hava tey fingið leigað trý hús í Havn fyri rímuligan pening. Uppá fyrispurning um tað er ein sera høg leiga, sum er orsøkin til, at fólk vilja lata hús síni leiga út bara í eina avmarkaða tíð sigur Ninna Vatnhamar, at tað er tað ikki. –Útlendska felagið setir stór krøv til góðar og vælhildnar íbúðir og rindar eina leigu, sum tað heldur er rímulig. Talan er um eitt leigumál frá hálvum mai til oktober.

Til skrivstovu hevur felagið leigað ovaru hæddina í bygninginum, har sethúsasølan millum Kissa og Føroya Banka heldur til, í Tórsgøtu 16. Sett er eitt skrivstovufólk og eitt fólk at taka sær av reingerð.

Fólkini, sum koma henda vegin at taka sær av uppgávunum hjá Dolphin Drilling, eru ein boristjóri, eitt roknskaparfólk og eitt fólk aftrat, sum hevur við logistik at gera. Øll hava tey hjúnafelagan við.

Ætlanin er, at boriskipið Bedford Dolphin skal koma á Nólsoyarfjørð umleið 1. juni. Hetta kann tó broytast. Tá verður skipið klarerað tvs. tollarar, løgregla, umboð fyri agentin oo. fara umborð. Skipið kemur ikki til kei í Havn, tí tað stingur alt ov djúpt. Tað stingur 18,5 metrar og er annars 205 metrar langt. Tað er uppá 40.362 bruttoregistartons.

## Bora 15. juni

Tað er torført at fáa nakra viðmerking frá Agip til komandi boring annað enn, at boribyrjan er sett til 15. juni. Men sum skilst er tað ikki enn heilt greitt, hvørji feløg og fyritøkur koma at taka sær av uppgávum við tilknýti til boringina. Tað stendur greitt, at Atlantic Supply Base í Runavík verður oljuútgerðarhavnin í hesi boring eins og hon hevur verið tað í øllum hinum trimum boringunum. Men ógreitt er, um tað verður Atlantsflog ella okkurt útlendskt felag, sum fer at taka sær av loftflutninginum í sambandi við boringina. Eisini er ógreitt í hvønn mun fyritøka her á landi fer at standa fyri at lata matvørur og annað í hesum sambandi. Tá hinir brunnarnir vórðu boraðir var tað Eurest Føroyar, sum hevði hesa uppgávuna.

Annars eru oljufeløgini, sum hava loyvi at leita, bundin til at brúka føroyskar vørur og tænastur um hesar eru kappingarførar. Sosialurin skilur, at onkur av føroysku fyritøkunum eru rættiliga ørkymlað, nú tey einki hava frætt og so stutt er til boristart. Eitt nú hevur Atlantsflog boðið uppá flúgvingina, men hóast tað bert er ein mánaði til at borað verður, so hevur fyritøkan enn einki endaligt svar fingið. Magni Arge, stjóri vil ikki gera nakra viðmerking í løtuni men váttar, at teir bíða eftir at frætta frá Agip. Hann dylur tó ikki fyri, at tíðin er knøpp at fáa alt uppá pláss, um teir ikki skjótt fáa eitt svar.

Í gjár var tekniskur fundur í Oljumálastýrinum. Umboð fyri Agip løgdu fram sínar ætlanir. Alex Buvik, sum skal tryggja, at alt er í lagi, áðrenn oljufeløgini fara undir at bora, sigur, alt hevur gingið eftir bókini og leggja teir nú síðstu hond á fyrireikingarnar. Umboð fyri Oljumálastýrið, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, løgregluna oo. fara í næstu viku til Las Palmas at hyggja eftir boriskipinum og tryggja sær, at alt er, sum tað skal har umborð, soleiðis at skipið lýkur føroyskar og altjóða reglur, tá tað kemur í føroyskan sjógv og skal seta borin í.

Boristaðið hjá Agip er stutt frá markinum. Prospektið borað verður eftir eitur Marimas. Samlaða arbeiðið er mett at taka einar 2-3 mánaðir.



*Borifelagið fer at halda til í ovaru hæddini í hesum hølunum, so tað verður granni til oljufelagið Statoil.*
*Mynd Jens K Vang*



*Bedford Dolphin, sum nú er í Las Palmas, har tað ger klárt at seta kósina móti Føroyum í næstum*
*Mynd Dolphin Drilling.*








# Tað sum hendur og armar kunnu skapa

**- Millum fjalla stríðast menn, tá ið streymurin fer - og fer telefonlinjan, tímir eingin í nútíðarsamfelagnum at bíða í tímar, til ringjast kann aftur. Steðga teldan og kaffimaskinan ov leingi, er rama skrýggj! Regn, stormur og kavakuldi spyrja ikki eftir, um tú tímir ella ikki, tá ið arbeiðini skulu gerast, segði funningsmaðurin, Petur Skeel Skarðsá á altjóða arbeiðaradegnum**



*- Samfelagið er lagað eftir teimum høgu lønunum og "modernaðu" familjunum við einum ella tveimum børnum. Ein stór barnafamilja rindar umvegis almennu skipanirnar ein hóp av pengum í landskassan - við gjøldum, sum venda tunga endan niðureftir, segði Petur Skeel Skarðsá í røðu síni á Vaglinum, 1. mai.*

ARBEIÐARADAGURIN
*Vilmund Jacobsen*

Millum røðararnar á Vaglinum, 1. mai, var verkamaðurin, Petur Skeel Skarðsá.

Í røðu síni segði hann, at altjóða arbeiðaradagurin, sum verður hildin kring um heimin, minnir okkum á, at tað enn eru mong, sum vinna til lívsins uppihald við tí, sum hendur og armar kunnu skapa.

- Hóast samfelagið er útbygt við allari tøkni og nútímans maskinum, er enn brúk fyri teimum, sum stríðast á einum køldum gólvi á einum fiskavirki. Eisini er brúk fyri teimum, sum renna við ruskposunum millum húsanna og syrgja fyri, at nútíðarsamfelagið ikki gongur undir í ruski og óruddi.

## Tøknin svíkur...

Hann segði, at á teimum stóru og moderniseraðu arbeiðsplássunum, har tey flestu sita heitt og fjálgt á sínum skrivstovum, verður tað ongantíð soleiðis, at ikki onkur noyðist út við spakanum, tá ið tøknin svíkur - ella, tá ið nýggjar innleggingar skulu fremjast.

- Regn, stormur og kavakuldi spyrja ikki eftir, um tú tímir ella ikki, tá ið arbeiðini skulu gerast. Millum fjalla stríðast menn, tá ið streymurin fer - og fer telefonlinjan, tímir eingin í nútíðarsamfelagnum at bíða í tímar, til ringjast kann aftur. Steðga teldan og kaffimaskinan ov leingi, er rama skrýggj!

Petur Skeel vísti á, at nútíðarsamfelagið setir stór krøv og tey, sum hava bestu umstøður í gerandisdegnum, eru oftast tey fyrstu at krevja uppaftur meira.

- Men vit kunnu ikki øll sita á skrivstovum og trýsta á knøttarnar við fremstafingri - frá tí, at sólin rísur, til hon fer í kav, legði hann aftrat.

## Samfelagskøkan

Og Petur Skeel helt fram:

- Vit, sum stríðast á gólvinum, framvið vegunum ella uppi millum fjalla, halda, at samfelagskøkan átti at verið rættvísari býtt.

Hann segði, at tá ið tey tímaløntu hava nakrar frídagar, sum nú um páskahøgtíðina, so missa hesi eisini burtur av lønini, sum frammanundan er ein hin lægsta í landinum.

- Men tað gera tey fastløntu ikki; tey fáa eisini løn teir dagar, tey ikki eru til arbeiðis. Er tað rættvíst, kunnu vit spyrja - og liva vit í einum solidariskum samfelag, tá ið vit, sum eru niðast á lønarstiganum, eru tey fyrstu, sum skulu missa?

Petur Skeel vísti á, at arbeiðarafjøldin er ikki so væl stillað, sum vælbjargaðu politikararnir, ið áseta sína egnu løn og pensjónir.

- Vit mugu stríðast fyri hvørjari krónu við samráðingum og verkføllum, tá ið semja ikki fæst um batar.

## Ófaklærd ella ikki

"Tey tímaløntu eru ófaklærd…"

- Soleiðis siga tey lærdu. Men er tað nú rætt? Er tað ein ófaklærd kvinna, sum hevur staðið á einum fiskavirkisgólvið í 25 ár - ella er tað ein ófaklærdur maður, sum hevur hildið vegirnar hjá kommununi ein hálvan mansaldur? Nei, eingin dugir at gera hetta arbeiði betur enn tey.

Petur Skeel segði, at føroyska samfelagið útflytir fiskavørur fyri miljardir.

- Vit teljast millum størstu matvøruútflytarar í heiminum pr. í búgva. Men hvør er tað, sum framleiðir hesar vørur til matna og skapar hesi stóru samfelagsvirðir? Hvaðani skuldi almenni sektorurin fingið sínar pengar til skrivstovufólkið og sítt virksemi annars, um verkafólksins hendur og armar ikki skaptu hesi virðir?

## Barnafamiljurnar

Hann vísti á, hvussu strævið tað er hjá eini barnafamilju, sum noyðist at lívbjarga sær við tveimum tímalønum.

- Tey megna ikki at seta føtur undir egið borð í dag. Samfelagið er lagað eftir teimum høgu lønunum og "modernaðu" familjunum við einum ella tveimum børnum. Ein stór barnafamilja rindar umvegis almennu skipanina ein hóp av pengum í landskassan - við gjøldum, sum venda tunga endan niðureftir.

Petur Skeel segði, at mvg er á breyði, mjólk, el, olju og telefon.

- Er familjan stór, bólgnar landskassin við pengum úr lummanum hjá teimum, sum hava nógvar munnar at metta.

Hann reisti eisini spurningin, um nøkur meining er í, at ein stór barnafamilja, sum frammanundan hevur ilt við at fáa endarnar at røkka, skal rinda meira í landskassan enn ein lítil familja?



*- Tey tímaløntu eru ófaklærd, siga tey lærdu. Er tað ein ófaklærd kvinna, sum hevur staðið á einum fiskavirkisgólvið í 25 ár - ella ein ófaklærdur maður, sum hevur hildið vegirnar hjá kommununi ein hálvan mansaldur? spurdi Petur Skeel Skarðsá.*
*Myndin er tilvildarliga vald.*

## Á annan bógv

- Eg haldi, at tey, sum smíða landsins lógir og ráða fyri borgum, áttu at lagt á annan bógv. Samfelagsskipanin eigur at taka støði í tímalønini, soleiðis at ein familja, sum hevur tvær tímalønir, kann fáa endarnar at røkka og hava eitt sámuligt lív.

Hann segði seg ikki misunna teimum nakað, sum eru í fastløntum størvum, men helt, at tann stóra arbeiðarafjøldin, sum skapar samfelagsvirðini við eini tímaløn, eisini hevur uppiborið at liva eitt mannsømiligt lív í Føroyum.

Petur Skeel Skarðsá las síðan upp eitt ørindi úr Fuglakvæðnum eftir Nólsoyar Páll:

*Kjógvin við sítt klipta vel,*
*hugsar hann so við sær.*
*Vertin á, hvat annar fær*
*- eg skal nøra at mær.*

Og síðan endaði hann røðu sína við hesum orðum:

- Lat okkum á hesum degi - altjóða arbeiðaradegnum - og í tíðini, sum kemur, eisini hugsa um grannan. Lat okkum ikki bara hugsa um, hvat tænir okkum sjálvum, men okkum øllum, sum saman skulu liva og virka her.